## Atli hjálpir til á Jellingfestivalinum



Tá myndamaður okkara leygardagin vitjaði Jellingfestivalin, hitti hann Atla Godtfred úr Havn framman fyri stóru senuna. Atli er við Reyða Krossi á Jellingfestivalinum. Atli Godtfred er saman við sjey starvsfeløgum frá Reyðakrossi Føroyar niðri á Jellingfestivalinum, har tey hjálpa til í vaktarskipaninin hjá Reyðakrossi í DK. Talan er um ólønt arbeiði, og Reyðikrossur Føroya sendi eisini fólk niður á festivalin í fjør. Tá portalurin hittiAtla, var hann í gongd við sína vakt, sum varar 12 tíma.

## Bilradio verður nú flutt til týsdag

Sendingin Bilradio á Rás2, sum higartil hevur verið send hósdag millum kl. 16 og 17. verður frá í morgin av flutt til týsdag millum kl. 16 og 18. Sendingin verður endursend fríggjamorgun millum kl. 8 og 9 og leygardag kl. 13.



# Reint flótandi luksus

**Petur Holm bjóðar nú føroyingum, íslendingum og grønlendingum luksus yachtirnar Azimut, sum er eitt ógvuliga kent italienskt merki av stuttleikabátum**

STUTTLEIKABÁTAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Petur Holm kom á Havnina við nýggja Azimut 43S bátinum leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað gerst alt meir vanligt, at føroyingar keypa sær stuttleikabátar. Tað skuldi eisini ligið til okkara at balst á sjónum og mongu bátastevnurnar bera eisini boð um, at føroyingum dáma væl at hugna sær í báti.

Nú er so eisini komið eitt føroyskt umboð fyri kendu italsku stuttleikabátarnar, Azimut. Tað er Paolo Vitelli, sum stovnaði fyritøkuna í 1969, og saman við hálendsku skipasmiðjuni, Amerglass, byrjaði hann at byggja hesar stuttleikabátarnar. Hetta samstarvið helt fram til 1985, tá Azimut fyritøkan keypti Benetti skipasmiðjuna.

Fyritøkan hevur alsamt vaksið um útboðið av bátum, og í dag byggir Azimut 17 støddir av flybridge bátum og fimm støddir av opnum bátum. Í fly-útgávuni fært tú bátar úr 39 fót heilt upp í 116 føtur. Opnu bátarnir fáast úr 43 fót upp í 103 føtur.

Tað er Petur Holm, fyrrverandi stjóri í Kaupthing, sum nú hevur fingið einaumboð fyri Azimut bátarnar í Norðurhøvum, tað vil siga Føroyum, Íslandi og Grønlandi.

- Tað verður kanska einahelst 39 fót flybridge bátarnir, sum hava áhuga millum føroyingar. Teir eru ógvuliga snøggir og ikki so dýrir. Teir fáast fyri umleið 2,7 milliónir krónur umframt mvg, sigur Petur Holm, stjóri á Melfar Marine Motoryachts.

Báturin hjá Peturi Holm sjálvum er ein Azimut 43S, sum er ein sonevndur opin bátur. Hann er, sum navnið sigur, 43 føtur langur og hevur tveir Volvo Penta motorar, sum hvør hevur 435 hestar. Skipasmiðjan sigur bátin hava eina mestu ferð upp á 33-34 míl, men Petur Holm sigur, at hann á túrinum úr Danmark til Føroya fekk hann heilt upp á 38 míl. Báturin kostar uttan eyka útgerð 4.050.000 krónur, og við teirri eykaútgerð sum er umborð á bátinum hjá Peturi Holm, kostar hann 4,7 milliónir krónur umframt mvg.

Sum nevnt byggir Azimut bátar heilt upp til 116 føtur, og tann dýrasti báturin, sum Petur Holm veit um er seldur av hesum slagnum, kostaði 75 milliónir.

- Men tað verður helst ikki so nógvir av tí slagnum seldir í Føroyum, sigur Petur Holm.

Umframt at hava umboð fyri bátarnar í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, umhugsar Petur Holm eisini at selja Azimut aðrastaðni.



*Báturin hevur tveir Volvo Penta motorar sum eru 435 hestar hvør, og teir heva eina mestu ferð upp á heilar 38 míl*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nýtt vinnufelag stovnað

**Mánadagin 26. mai 2008 varð nýtt vinnufelag stovnað. Tað eru ráðgevandi virkir innan føroysku byggivinnuna, sum hava tikið stig til at stovna nýggja felagið; Ráðgevara felagið. Felagið hevur 20 limir, sum eru fyritøkur, sum veita ráðgeving innan byggivinnuna, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu síni**

VINNUFELAG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum vóru Rúni Abrahamsen frá MAP-arkitektum, Árni Winther, frá Arkitektavirkinum Árna Winther Arkitektum og Kim Hansen, frá LBF valdir í nevndina. Sum eykalimir vóru Árni Jakobsen frá Sofus M. Jakobsen og Pætur Húsgarð frá PB-Consult valdir. Nevndin hevur skipað seg við Rúna Abrahamsen sum formanni.

Endamál felagsins er at savna allar ráðgevandi fyritøkur við heimstaði í Føroyum, serliga í byggivinnuni at útinna felags áhugamál. Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum karmum virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu.



Eitt av týdningarmestu málunum, sum felagið ætlar at taka upp beinanvegin er, at fáa samband við almenna byggiharran um, hvørji viðurskifti skulu vera galdandi, tá byggiverkætlanir verða skipaðar. Ráðgevarafelagið heldur, at tað er av alstórum týdningi, at føroyskar fyritøkur fáa javnbjóðis høvi at bjóða seg fram ájavnt við útlendskar fyritøkur. Dømi eru um útbjóðingar har føroyskar ráðgevandi fyritøkur ikki hava fingið javnbjóðis møguleikar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at ráðgevandi virkir innan byggivinnuna taka seg saman í vinnufelag, og at felagið hevur valt at húsast saman við Arbeiðsgevarafeløgunum og vinnufeløgunum í Vinnuhúsinum.